## NÁMSFRØÐINGUR SØKIST



**Í Sjálvsognarstovninum Barnagarðurin á Teiginum heima á Sandi, eru 7 fitt skúlabørn í aldrinum 7–8 ár, sum hava ansingarpláss í barnagarðinum eftir skúlatíð. Søkt verður eftir einum námsfrøðingi at arbeiða við hesum børnum, hvønn gerandisdag, 30 tímar um vikuna.**

**Krøvini til tín eru:**

- at tú ert fyrikomandi og erligur
- at tú dugir at arbeiða sjálvstøðugt og ábyrgdarfult í samráð við børnini
- at tú heldur arbeiði við børnum í 7–8 ára aldri vera spennandi og avbjóðandi
- at tær dámar at vera úti í øllum veðri
- at tú ert nærlagdur og dugir at lurta

**Børnini vilja:**

- at tú dugir at spæla fótbólt
- at tær dámar at ganga túrar á fjall og í fjøru
- at tú dugir ymisk dreingjaspøl
- at tú dugir at fanga krabbar
- at tú dugir at reypa og siga søgur

Góðir møguleikar eru at nýta fimleikahøll og fótbótlsvøllir í arbeiðinum.

Arbeiðstíðin er mánadag–hósdag kl. 10.30–17.00 og fríggjadag kl. 13.00–17.00.

Starvið verður lønt smb. sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Lailu M. Petersen, stovnsleiðara, á tlf. 361750 / 270720.

Skrivlig umsókn skal sendast til Sjálvsognarstovnin Barnagarðin á Teiginum, FO-210 Sandur. Umsóknarfreistin er úti 18.10.04. Starvið verður sett 20.10.04. Um eingin námsfrøðingur søkir, verður hjálparfólk fyribils sett í starv til og við 20.01.2005.

**Sjálvsognarstovnurin Barnagarðurin á Teiginum**

## Mercedes bussur til sølu

Bussurin er frá 8/94 er góðkendur til 23 ferðandi + bilføra. Hann hevur koyrt uml. 400.000 km. Bussurin er útgjørdur við lyft, bakkamera og radio v/fløguspælara og píkadekk fylgja við.

Boð undir 50.000 kr. ongan áhuga.

Boð kunnu latast innan 17/10-04 á tlf. 456387, 225188 ella á fax 455153

**Klaksvíkar býráð Smiðjan**

**Landssjúkrahúsið**
Starvsfólkadeildin

## Sjúkrarøktar-frøðingur til D5

Á Deild 5 er heiltíðar farloyvisstarv sum sjúkrarøktarfrøðingur leyst at søkja til setan 1. november 2004 til 30. apríl 2005.

Deildin er ein deild til stutt- og langtíðar psykiatriska røkt, har arbeitt verður eftir miljø-terapeutiskum meginreglum og kontaktpersónsskipanini. Arbeitt verður fram ímóti at geva sjúklinginum økt sjálvbjargni og við tíðini møguleikan at flyta í egnan bústað. Deildin er í støðugari menning, og tað starvast sjúkrarøktarfrøðingar, pleygarar og heilsurøktarar í tøttum samstarvið við aðrar fakbólkar, bæði innan-og uttanhýsis.

**Krøv til umsøkjarar:**

- prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
- góð samstarvsevni
- fakligan áhuga inna tað psykiatriska økið

**Vit kunnu bjóða:**

- eitt dynamiskt, fjølbroytt og vinarligt arbeiðsumhvørvi
- fakliga kompetentar og virknar starvsfelagar
- positivt tvørfakligt samarbeiði
- ávirkan á fagliga menning
- góða innleiðslu (introduktión)

**Setanartreytir:**
Løn og setanartreytir smb. sáttmálan millum Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar og Fíggjarmálaráðið.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja telefon 304500, Bergit Weihe, leiðandi sjúkrarøktarfrøðingur, lokal 4102, e-postur bergitw@lsh.fo ella til Liss Jakobsen, deildarleiðara á D5, lokal 4005.

**Umsóknarfreistin** er 18. oktober 2004 kl. 12.00.

**Skrivlig umsókn**, merkt »umsókn til starv« við avriti av prógvum, CV og viðmælum e.l. skal sendast til

**Landssjúkrahúsið**
Starvsfólkadeildin
100 Tórshavn

*Á heimasíðuni hjá Landssjúkrahúsinum www.lsh.fo sæst meira um størv við at klikka á leinkjuna »starvsfólk«*

## Seyðaskinn

Vit taka ímóti feskum seyðaskinnum frá mánadegnum 4. oktober frá klokkan 15.00–22.00.

Skinnini skulu vera hagreidd eftir forskriftunum. Pesjur verða ikki tiknar.

**AG Kjøt**
Toftir
Tlf. 258994

**Fiskirannsóknarstovan**

## Søkt verður eftir verkfrøðingi

Fyri starvsfólk í farloyvi søkir Fiskirannsóknarstovan eftir fólki í eitt 2 ára tíðarskeið til data viðgerð og viðlíkahald av tólum. Starvið umfatar viðgerð av m.a. streym-, hita- og saltmátingum. Harumframt umfatar arbeiðið eisini viðlíkahald av tólum eins og at gera tól klár til mátingar og annað hesum viðvíkjandi.

Umsøkjarar skulu hava verkfrøði prógv við høvuðsgrein innan matematikk, fysikk, geofysikk, elektronikk ella samsvarandi øki.

Løn og setanartreytir vera sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og avvarandi fakfelag.

Umsóknir við prógvum og c.v. skulu sendast til:

**Fiskirannsóknarstovan**
Boks 3051
FO-110 Tórshavn

og vera okkum í hendi í seinasta lagi 15. oktober 2004.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Karin Margrethu H. Larsen á Fiskirannsóknarstovuni, tlf. 35 39 00.

## Pedagogur

Frítíðarskúlin í Sørvági søkir eftir einum pedagogi at arbeiða 20 tímar um vikuna, frá 1. nov. 2004 til 1. juli 2005. Lønarstig 10/16.

Frítíðarskúlin er ein deild undir barnagarðinum Sýsluni og heldur til í SÍ-húsinum.

Í Frítíðarskúlanum eru børn frá 1. flokki til 3. flokk.

**Vit ynskja at umsøkjarin**

- hevur góð samstarvsevnir
- er røkin, nærlagdur og álítandi
- nýhugsandi og ígongdsetandi
- dámar væl úti í náttúruni

Løn sambært sáttmála mála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

Meira fæst at vita við at ringja til okkum og tosa við leiðaran, Borgarhjørt Larsen, tlf. 332948.

Umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmælum skal vera okkum í hendi seinast 20. november.

## Ídnaðarøki til sølu

Um nóg høgt boð fæst, er matr. nr. 1ok á Sandvíkahjalla, 2.253 m², til sølu.

Nærri upplýsingar fáast á telefon 314555 ella 594555.



## Vallisti

Vallistin til kommunuvalið 9. november 2004 yvir veljarar í Sørvágs Kommunu liggur frammi til alment eftirlit á kommunuskrivstovuni í vanligari skrivstovutíð frá 04. til 18. oktober 2004.

Kæra um, at onkur av órøttum er komin á listan, ella onkur rættkomin ikki er tikin við, skal í seinasta lagi 1 viku fyri valdagin verða send valnevndini, sum kannar og tekur endaliga avgerð í málinum.

**Sørvágs Kommuna**

## Kunngerð

Við hesum verður gjørt kunnugt, at vallistar til kommunuvalið 9. november 2004 fyri valdømið í Oyndafjarðar kommunu liggja frammi til alment eftirlit í handlinum hjá Eivind í døgunum frá 11. oktober 2004 til 25. oktober 2004 í upplatingartíðini.

Kæra um, at onkur ikki er komin á listan ella, at onkur av órøttum er tikin við, skal skrivliga vera bygdaráðnum í hendi í seinasta lagi 01. november 2004.

**Oyndarfjarðar bygdaráð**
30. september 2004

## Kunngerð

Við hesum verður kunngjørt, at vallistarnir til kommunuvalið 09. november 2004 fyri valdømini í Skála Kommunu, liggja frammi til alment eftirlit á kommunuskrivstovuni í Skála og í handlinum hjá Elspu Jacobsen í Skálafirði frá 11. oktober 2004 til 25. oktober 2004 í vanligari arbeiðstíð.

Kæra um, at onkur ikki er komin á listan ella, at onkur av órøttum er tikin við, skal skrivliga vera bygdaráðnum í hendi í seinasta lagi 01. november 2004.

30. september 2004.

**Skála kommuna**
**480 Skála**

## Kunngerð

Við hesum verður gjørt kunnugt, at vallistarnir til kommunuvalið 09. november 2004 fyri valdømini í Elduvíkar Kommunu, liggja frammi til alment eftirlit í skúlanum í Funningsfirði og í skúlanum í Elduvík frá 11. oktober til 25. oktober 2004.

Kæra um, at onkur ikki er komin á listan ella, at onkur av órøttum er tikin við, skal skrivliga vera bygdaráðnum í hendi í seinasta lagi 01. november 2004.

30. september 2004.

**Elduvíkar Kommuna**
FO-447 Funningsfirði



## Kunngerð

Við hesum verður gjørt kunnugt, at vallistin til kommunuvalið 9. november 2004 fyri valdømið í Runavíkar kommunu liggur frammi til alment eftirlit á kommunuskrivstovuni í Saltangará í døgunum frá 11. oktober 2004 til 25. oktober 2004 í vanligari skrivstovutíð.

Kæra um, at onkur ikki er komin á listan ella, at onkur av órøttum er tikin við, skal skrivliga vera býráðnum í hendi í seinasta lagi 01. november 2004.

**Runavíkar býráð**
*30. september 2004*

## Kunngerð

**frá útskiftingarnevndini fyri Uppsalahaga í Klaksvík**

Á nevndarfundi tann 25. september 2003 staðfesti útskiftingarnevndin, at skiftið verður at fremja, og at fyribilsplanur verður gjørdur, sum vísir, hvussu ætlanin er at skráseta innleggið í matrikli og á matrikulkorti.

Fyribilsplanurin skal um møguligt eisini vísa ætlaðar vegføringar.

Fyribilsplanurin er nú gjørdur og liggur frammi hjá Klaksvíkar kommunu og á Matrikulstovuni.

Viðmerkingar til fyribilsplanin skulu vera skrivligar og stílast til útskiftingar-nevndina, Matrikulstovan, boks 327, 110 Tórshavn innan 19. oktober 2004.

Útskiftingarnevndin tekur støðu til øll skriv og leggur úrslitið fram á fundi í Klaksvík, har møguligi innangarðsútskifting eisini verður viðgjørd.

*Tórshavn, tann 29. september 2004.*
N. v.
**Øssur Á. Midjord**
útskiftingarnevndarformaður

## BRENNIOVNAR



**XENIA**
- Hædd 104,4 x breidd 55 x dýbd 47
- Stórt brennikamar
- Kann hita upp 60 m²

**6.398,-**



**SIRIUS**
- Hædd 90,4 x breidd 55,7 x dýbd 42,7
- Effekt 5 KW
- Kann hita upp 60 m²

**3.998,-**



**NORDIC**
- Hædd 90 x breidd 52 x dýbd 40,1
- Sjálvreinsandi rút
- Roykrør aftan ella omaná
- Kann hita upp 100 m²

**9.998,-**



**ALFA**
- Hædd 95 x breidd 48,5 x dýbd 36
- Stórt brennikamar
- Kann hita upp 30 - 100 m²
- Roykrør aftan

**4.998,-**



**RONA**
- Hædd 104,4 x breidd 60 x dýbd 52,4
- Effekt 8 KW
- Kann hita upp 100 m²

**10.998,-**

**damor**
KVÍGGJARTÚN 3 • ARGIR • TEL 315415 • FAX 319001

Lesið **Sosialin** – so eru tit við

## Nýggjar TANNPROTESUR

r tin ar u v lin ar av lu r t su

Kliniskur tannteknikari
**Bergur á Reynatrøð**

Opið er:
mánadag-hósdag frá kl. 9-16
fríggjadag frá kl. 9-12

Børkuvegur
620 Runavík
Tlf. 448480

**Frá Suðuroyar Norðara Javnaðarfelag**

2. og møguliga 3. uppstillingarfundur verður týskvøldið 5. oktober kl. 20.00 í Fylking

**Nevndin**

**Suðuroyar Norðara Javnaðarfelag**
www.javnadarflokkurin.fo